## UTTAN ÚR HEIMI

## ES skal hava betri javnstøðu

ES-nevndin hevur sett javnstøðu á dagsskránna og ætlar sær at kanna viðurskiftini ímillum arbeiðslívið og privatlívið umframt kønarviðurskiftini á teimum báðum kynunum. Endamálið er sambært nevndini at stinga út í kortið, hvussu javnstøðan skal tryggjast betur í teimum 25 limalondunum.

Hagtøl vísa, at í meðal fáa kvinnur 15 prosent minni í løn enn menn í ES-londunum, og hesum vil nevndin til lívs. Vladimir Spilla, kommiserur í arbeiðsmarknaðarmálum, sigur við Reuter-tíðindastovuna, at tað kann ikki góðtakast, at annar helmingurin av fólkinum í samveldinum fær minni í løn enn hin.

Ein nýggj kanning avdúkar, at tað eru framvegis javnvágin ímillum arbeiðslívið og privatlívið og kynsdiskriminerandi lønarskipanir, sum forða kvinnunum at vinna fram á arbeiðsmarknaðinum, og sum í mongum førum noyða tær at gevast at arbeiða. Ein onnur týðandi niðurstøða í kanningini er, at tey truplu viðurskiftini hjá kvinnunum gera, at tær fáa færri børn, og tað kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri búskapin í framtíðini.

Tey seinastu hagtølini hjá ES vísa, at á leiðarastigi eru bara 32 prosent av størvunum mannað við kvinnum, í nevndum eru bara 10 prosent kvinnur, og kvinnurnar hava bara 3 prosent av stjórastørvunum í teimum størstu fyritøkunum.

## Duldi HIV í níggju ár

Í níggju ár livdi ein svensk kvinna saman við manni sínum uttan at siga honum frá, at hon var smittað við HIV. Tað var frá 1995 til 2004, og hesi árini fingu hjúnini tvey børn. Nú er kvinnan ákærd fyri grovt ósketni og fyri at hava komið bæði manninum og børnunum í vanda.

Aftonbladet skrivar, at á einari uttanlandsferð í 1995 bleiv kvinnan smittað við HIV. Nakað seinni fór hon til læknan, sum staðfesti, at hon var smittað, men kvinnan duldi tað fyri manninum. Læknin segði heldur einki, tí kvinnan vissaði hann um, at hon og maðurin høvdu einki kynsligt samband longur. Men tað var ósatt. Í 2002 fingu hjúnini eitt barn, og árið eftir fingu tey eitt afturat.

Báðar ferðirnar varð kvinnan spurd, um hon vildi verða HIV-kannað, men hon tók ikki av tilboðnum. Men tá hon í 2004 noyddist á sjúkrahús við bruna, varnaðust læknarnir, hvussu vorðið var, og teir boðaðu alt fyri eitt manni hennara frá. Málið endaði eisini hjá løgregluni, sum hevur ákært kvinnuna. Harafturat er málið endað hjá sosialu umsitingini, sum skal gera av, hvat av foreldrunum skal hava umsorgan fyri teimum báðum børnunum.

## Dana Reeve deyð

Dana Reeve, sum var gift við amerikanska filmsleikaranum Christopher Reeve, doyði í gjár av lungnakrabba. Hon var 44 ára gomul.

Eftir at maðurin doyði í 2004, arbeiddi Dana við at útvega lammaðum fólki betri umstøður. Hetta var eitt øki, sum hon hevði fingið drúgvar royndir á, eftir at maður hennara gjørdist lamin aftan á eina vanlukku í 1996, tá hann datt av einum rossi.

Í august í fjør staðfestu læknarnir, at Dana Reeve hevði lungnakrabba.

## Skúlaveitsla ov vill

Á hvørjum ári halda amerikanskir studentar eins serliga veitslu um várið, sum teir rópa Spring Break, men nú ávara læknarnir genturnar ímóti at at gera ov nógv av.

Læknarnir vísa til eina kanning hjá amerikanska læknafelagnum, sum vísir, at á Spring Break drekka 83 prosent av gentunum meiri, enn tær annars gera, og at 75 prosent av teimum gera meiri burtur úr tí kynsliga tá enn hinar dagarnar á árinum. Ja, sambært kanningini hava nógvar av gentunum samlegu við meiri enn einum mannfólki á veitsluni uttan at brúka nakað fyribyrgjandi, skrivar AP, sum ikki væntar, at ávaringin frá læknunum fer at fáa nakra ávirkan.

# Harðskapur móti kvinnum

## – ein fólkaheilsutrupulleiki

**Harðskapur móti kvinnum er ein ovurhonds stórur trupulleiki í øllum heiminum, ávarar ST um í nýggjari kanning**

HARÐSKAPUR
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

**ST:** Hann er í øllum londum og innan allar samfelagsbólkar

Sambært nýggjari kanning, sum heilsustovnurin hjá ST, WHO, hevur gjørt í tíggju londum, eru millum 15 og 70 prosent av kvinnunum fyri kynsligum ella øðrum kropsligum harðskapi frá partnaranum. Kvinnur í fátækum landbúnaðarøkjum eru í størsta vanda fyri at vera fyri harðskapi frá partnaranum. Tess hægri útbúgving, status og møguleika fyri ávirkan á egið lív, kvinnan hevur, tess minni er vandin fyri at vera fyri harðskapi, sigur nýggja kanningin.

### Í øllum samfelagsbólkum

Tilsamans tóku 24.000 kvinnur lut í kanningini, og vísir hon, at harðskapur í heiminum kemur fyri í øllum safelagsbólkum. Harðskapurin ávirkar ikki bara kvinnurnar likamliga, men tær hava eisini nógvar ósjónligar trupulleikar at dragast við, so sum svimbul, vánalig bindindi, rørslutrupulleikar, tunglyndi og royndir at gera sjálvmorð, ið alt eru dømi um langtíðarávirkanir.

### Vilja ikki nýta hít

Millum 5 og 28 prosent av kvinnunum høvdu verið fyri harðskapi, meðan tær vóru við barn. Oftast var gerningsmaðurin eisini pápi at barninum. Í mongum førum varð úrslitið av slíkum harðskapi, at kvinnan aborteraði.

Ein serliga álvarslig fylgja av harðskapinum er, sambært WHO, økti vandin fyri spjaðing av HIV og AIDS, tí nógvir harðligir menn vilja ikki nýta hýt, og kvinnurnar hava ikki dirvi til at standa ímóti, av ótta fyri harðskapinum.

### FAKTA

**Soleiðis kann harðskapur móti kvinnum steðgast**

At starvsfólkini á sjúkrahúsum verða útbúgving at kenna á einari kvinnu, um hon hevur verið fyri harðskapi.

At bøta um møguleikan fyri hjúnarskilnaði. Her verður hugsað um fíggjarligan tryggleika og rættin til børnini, sum eru trupulleikar í summum londum.

Upplýsing um javnrættindi í skúlanum. At geva gentum og ungum kvinnum betri útbúgving og ræðið yvir persónligu fíggjarstøðuni.

Politiskir og religiøsir leiðarar mugu átala harðskapi móti kvinnum. Í mongum londum verður harðskapur móti kvinnum mett sum natúrligt.

Betri lógarkarmar og fleiri løgreglukvinnur.

Fleiri kvinnuskýli og stuðulsmøguleikar til kvinnur, sum liva við harðskapi.

*Kelda: WHO*

**Um kanningina**

Tey tíggju londini í kanningini hjá WHO: Japan, Brasilia, Serbia-Montenegro, Peru, Bangladesh, Tanzania, Namibia, Tailand, Samoa och Etiopia.

Kvinnur, sum eru fyri harðskapi og neyðtøku, hava tvær ferðir vánaligari heilsu enn kvinnur sum ikki eru fyri harðskapi.

Sjálvmorðsroyndir eru fýra ferðir vanligari millum kvinnur, sum eru fyri harðskapi frá manninum.

Mest vanligi harðskapurin er lúsingur. Næst er nevaslag í andlitið. Helvtin av raktu kvinnunum høvdu verið fyri grovum harðskapi, so sum sparki, roynd av kvala og hóttan við vápni.

Fýra av fimm harðskapsraktum kvinnum søkja sær ikki hjálp frá løgreglu ella á sjúkrahúsi. Nógvar siga heldur einki fyri familju ella vinum.

*Kelda: WHO*

# Sungu fyri fullum húsum í Keypmannahavn



*Dagarnir á Hotel Tórshavn kunnu væl gerast langir, tí var konsertin sunnukvøldið eitt frískt innslag*

**Um vikuskiftið var Gentukórið Kassia á konsertferð í Keypmannahavn. Millum tiltøkini var konsert á Hotel Tórshavn, har kórið sang fyri øllum teimum nógvu føroyingunum, ið búleikast har.**

KONSERT
*Orð/myndir Símun Jóannesarson*

Gentukórið Kassia úr Havn var um vikuskiftið á konsertferð í Keypmannahavn. Tær sungu í Kristnastovu á Amager, Glostrup Frikirke, Kristeligt Fællesskab í Rødovre og á Hotel Tórshavn. Allastaðni sungu tær fyri fullum húsum og vælnøgdum áhoyrarum. Av tí at tað var stúgvandi fult av fólki til konsertirnar vórðu summi noydd at standa í gongini.

Sosialurin var við á konsertini á Hotel Tórhavn, tá tær sunnukvøldið sungu fyri teimum, sum búgva har. Dagarnir kunnu gott gerast langir á sjúklingahotellinum, bæði fyri sjúklingar og avvarandi. Tí var hetta eitt frískt innslag, sum øll vóru glað fyri.

Á konsertunum framførdi Kassia sangir á bæði føroyskum, donskum og enskum. Sangirnir umboðaðu ymiskar sangstílar, summir vóru lættir og aðrir stillir og vakrir. Nógvar góðar einrøddir vóru at hoyra, og onkrir sangir vóru eisini kryddaðir við góðum cellofylgispæli. Meðan genturnar høvdu ein lítlan steðg, sungu kórleiðararnir nakrar sangir.

Genturnar hugnaðu sær óført, og tær eru glaðar fyri, at kórleiðararnir tóku hetta stigið, hóast tað var strævið og eyguni vóru eitt sindur tung á konsertini sunnukvøldið.

Genturnar syngja reint og tað hoyrist, at tær eru ikki heilt óvandar at syngja. Kórið, sum hevur nøkur ár á baki, er samansett av gentum, sum eru 10-14 ára gamlar.

22 gentur vóru við í ferðalagnum. Kórleiðarar eru: Charlotta á Váli Olsen, Brita á Váli Smith, Poula Sørensen, og Anna Maria E. Anthoniussen. Kári við Rættará er klaverspælari hjá kórinum, Ólavur á Váli Olsen spælir bassgittar, og Anna á Váli Smith spælir cello.